TVØROYRAR KOMMUNA

## LEIÐARI TIL FRÍTÍÐARSKÚLAN

Søkt verður eftir leiðara til Frítíðarskúlan í Tvøroyrar kommunu fyri leiðara í barnsburðrafarloyvi í 1 ár.

**Stovnslýsing:**
Frítíðarskúlin er normeraður til 24 børn í 1. og møguliga 2. og 3. flokki. Hann heldur til í hølum hjá Trongisvágs Skúla, í náttúruríkum og barnavinarligum umhvørvi.

**Starvslýsing:**
Talan er um eitt avloysarastarv 40 tímar um vikuna. Arbeiðið er deilt upp soleiðis at 20 t./v. er sum leiðari og 20 t./v. sum pædagogur. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi millum kl. 10.00-18.00. Starvið verður sett í tíðarskeiðnum 01.03.07-01.03.08.

Bert umsøkjarar við námsfrøðiligum prógvi kunnu søkja starvið.

**Vit vænta av tær:**
- at tú hevur góð samstarvsevni
- at tú ert nærløgd/lagdur
- at tú kanst laga teg eftir skiftandi arbeiðstíðum
- at tú ert kreativ/ur
- at tú ert før/ur fyri at taka tað fakligu, fíggjarligu og fyrisitingarligu ábyrgdina av stovninum.

**Lønarviðurskifti:**
Løn sambært sáttmála við viðkomandi fakfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Susanne Madsen á sosialu deild, tlf. 371085.

Freistin at søkja starvið er 16/2-07

Umsókn saman við prógvum o.ø., verða at senda til

**Tvøroyrar kommuna**
Sosiala deild
Postboks 80
FO- 800 Tvøroyri




# Poker.fo til sølu

Økisnavnið verður selt um hóskandi boð fæst.

Áhugað kunnu skriva til dt@kult.fo

# Farloyvisstarv fyri umsitingarleiðara til Skopunar Kommunu

Søkt verður eftir umsitingarleiðara til Skopunar Kommunu, fyri fólk sum fer í farloyvi.

**Starvið**
Starvið fevnir um bókhald, fakturering, journalisering, fólkayvirlit, telefon-avgreiðslu og annað vanligt skrivstovuarbeiði. Arbeiðið umfatar eisini at tú ert skrivari á fundum hjá kommunustýrinum og nevndum.

**Førleikakrøv til umistingarleiðaran:**
Vit vænta:
- At tú hevur hægri útbúgving innan hetta økið.
- At tú megnar at arbeiða sjálvstøðugt og dugir at samstarva.
- At tú hevur royndir við at bóka/fakturera og hevur góðan teldukunnleika.
- At tú hevur góð evni at orða teg bæði skrivliga og munnliga.
- At tú er álítandi og tekur ábyrgd av tínum arbeiði.
- At tú er arbeiðssamur, røkin og fyrikomandi.

**Umsóknir**
Umsóknir við próvskjølum, og møguligum viðmælum, skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 15.02.2007.

**Skopunar Kommuna, FO-240 Skopun**



Mentamálaráðið
Vinnu- og miðnámsskúladeildin

## SJÁLVLESANDI

Innskriving til próvtøku í ymsum miðnámsútbúgvingum

Sjálvlesandi, her í millum umgangarar, ið á sumri 2007 ætla sær til próvtøku í Students-, HF-, FHS-, SIF-, HH-, HT- ella HIF-útbúgvingunum, skulu í seinasta lagi 25. februar 2007 innskriva seg til próvtøku við tann skúlan, har tey ætla sær til próvtøku. Innskrivingarblað og treytir fyri innskriving fáast frá skúlanum.

*6. februar 2007*
***Mentamálaráðið***

## NEYST Í VESTMANNA TIL SØLU

Neyst úti á Grønanesi í Vestmanna verður við hesum lýst til sølu.

Talan er um neyst í tveimum hæddum. Niðara hæddin er í einum. Á ovaru hæddini er lítil køkur, wc v/brúsu, skiftingarrúm, umframt eitt óinnrættað rúm. Innandura trappa er millum hæddirnar.

Neystið er uml. 60 $m^2$ og bygt í 1996. Tað er eisini vælegnað til bát á vogni.

Grundøkið er sambært tingbókini 54 $m^2$ til víddar.

Áhugaði kunnu venda sær til Elspu J. Hansen, skrivara, eh@lawfirm.fo.

**ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4**
YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 311260 · FAX 311261 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
EMAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO
**WWW.LAWFIRM.FO**
TÓRMÓÐUR DJURHUUS · JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD · JÓHAN J. LAMHAUGE
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR

# LÆRARI TIL HOYVÍKAR SKÚLA

Søkt verður eftir lærara frá 1. mars og restina av skúlaárinum. Starvið er 27 undirvísingartímar í trimum toymum:

4. flokkur: flokslærari, støddfrøði, enskt, danskt, náttúra og tøkni, ítróttur og stuðul.
5. flokkur: enskt og ítróttur.
7. flokkur: dansk.

Lønt verður eftir sáttmála við fíggjarmálastýrið.

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving og royndum skulu sendast til:

Hoyvíkar Skúla
Postrúm 3073
110-Tórshavn

Umsóknir skulu vera okkum í hendi seinast hósdagin 22. februar klokkan 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlastjóran á tlf 302590 ella 227603.

Birgit Arge
Skúlastjóri
Hoyvíkar Skúli

Í Hoyvíkar Skúla ganga 465 næmingar.
37 lærarar starvast í skúlanum.

